# Nú eiga springararnir tørn

**Føroysk vísindafólk kanna springarar, døglingar og hvessing eftir áheitan frá NAMMCO. Granskararnir vilja fegnir fáa so neyvar upplýsingar sum gjørligt um eitt nú liviháttin hjá hvalunum**

HVALAKANNING
*Edvard Joensen*



*Dorete Bloch Danielsen, professari í ferð við at taka royndir av einum springara, sum legði beinini í Hvalvík týsdagin*
*Mynd: Edvard Joensen*

Tey kanna aftur hval á Náttúrugripasavninum. Hesaferð eru tað springarar, hvessingar og døglingar, sum hava stóra áhugan, sigur Dorete Bloch Danielsen, profesasri, sum leiðir kanningarnar.

Kanninganar, sum nú verða gjørdar, fara fram á leið á sama hátt, sum stóra grindakanningin, ið gjørd varð fyri nøkrum árum síðan. Stórur dentur verður lagdur á at fáa so neyvt innlit í livaháttin hjá hvalunum, sum gjørligt.

At hesar kanningarnar verða gjørdar í Føroyum, kemst av veiðuni, sum er her hjá okkum. Bæði springarar og viðhvørt eisini hvessingar verða hildnir til, og av og á ger onkur døglingur eisini landsgongd her. Tí er tað upplagt, at heitt verður á føroyingar um at gera slíkar kanningar, sigur Dorete Bloch.

Eisini letur hon at, at føroyingar eru sera samstarvshugaðir, og tað fegnast granskararnir um. Granskararnir fáa boð, beinanveg grindaboð eru givin, og fólk eru skjót at rætta eina hjálpandi hond á staðnum, har royndir verða tiknar og kannað annars verður.

## Taka royndir

Vit sita á stjóraskrivstovuni á Djóradeildini hjá Náttúrugripasavninum í Fútalág í Havn.

Tað er trongt, og ikki serliga lætt atkomiligt her í húsinum. Hølisviðurskiftini eru vánalig, fyri at siga akkurát, sum tað er. Fult av ritgerðum her og har. Kassar við kanningarúrslitum. Tekningar og plakatir av ymsum kríatúrum og fuglum. Á gólvinum í tí, sum einaferð var stovan í hesum fyrrverandi sethúsunum, stendur beinagrindin av eini kollutari kúgv, øll sum hon er.

Og mitt í øllum hesum rokinum hevur Dorete Bloch Danielsen, fyrsti kvinnuligi professari í Føroyum, og leiðari á deildini, funnið sær ein stól, har hon so dánt sleppur fram at skriviborðinum,

– Tað er NAMMCO, sum hevur heitt á okkum um at gera hesar kanningarnar, greiðir Dorete Bloch frá. Aftur at sær hevur hon tvey fólk, sum knýtt eru beinleiðis at hesi kanningini.

So ringir telefonin, og professarin tekur hana. Hevur ongan skrivara til slíkt. Hon tosar eitthvørt við onkran, sum ivaleyst vil frætta eitt sindur frá springarunum í Hvalvík.

Eftir samrøðuna klárar hon so dánt at ringja til onkran annan í húsinum og biða tey um at taka telefonina, næstu ferð hon ringir. Og tað ger hon so beinanveg. Men nú hevur professarin betri tíð at tosa við blaðið.

– Av tí, at lítið er kent, hvussu springari livir, er tað týdningarmikið fyri vísindafólkini at fáa so neyvar upplýsingar, sum gjørligt. Til tess verða tiknar royndir av teimum hvalum, atgongd fæst til. Eitt nú doyðu 35 springarar í Hvalvík týsdagin, og har vóru fólk frá Náttúrugripasavninum og tóku royndir.

– Vit tóku tað, vit á vísindamálið kalla »Full Samples« av øllum hvalunum, greiðir Dorete Bloch frá.

Talan er um at fáa støðd og kyn á hvalunum, sum grindaformenn og merkjarar hava verið óførir at latið teimum, sigur hon. Síðan verður farið eftir vekt, eins og royndir verða tiknar av bæði tvøsti og spiki, livur, nýrum og kynsgøgnum. Kannað verður eisini eftir, um honirnar mjólka.

Til tess at staðfesta aldurin á teimum einstøku hvalunum, verður undirkjafturin tikin úr. Sagaður ella høgdur, og síðan verður aldurin staðfestur út frá tonnunum.

– Men tað er ein longri søga, sum kann taka rættiliga langa tíð, greiðir Dorete Bloch frá.

## Norðasti stovnur

Hóast vísindafók vita rættiliga nógv um ymsar hvalastovnar, eru tó onkur glopp. Eitt nú um springara og hvessing vita tey ikki alt, sum ynskiligt er, sigur Dorete Bloch.

Hóast føroyingar leingi hava vitað, at hvessingur livir um okkara leiðir, eru tað ikki øll vísindafólk úti í heimi, sum hava hildið hetta borið til, veit Dorete Bloch at siga frá. Men nú er so staðfest, at hvessingurin her hjá okkum er tann norðasti í heiminum yvirhøvur, greiðir hon frá.

– Og springararnar vita vit lítið um soleiðis reint lívfrøðiliga, sigur hon. Hvussu teir liva, og hvat teir eta. Millum annað hetta fara vit at royna at fáa greiði á við kanningini, vit nú gera.

Tað gongur rætta vegin við at fáa upplýsingar til vega, letur hon at. Einar 100 springarar hava tey vigað her, og longd og vekt av 64 hvalum hava tey fingið úr Hollandi, og verða hesi eisini brúkt í kanningini. Umframt hava tey fingið mátini av meira enn 1.200 springarum, so nakað er at taka av.

Eitt ynski er, sum vísindafólkini, ið gera hvalakanningarnar, fegin vilja hava uppfylt, Og tað er at fáa totalvektina av einum døglingi.

Og tað skuldi verið møguligt. Sjálvandi við teirri fyritreyt, at onkur døglingur leggur beinini her. Tí Náttúruggripasavnið hevur vekt, sum klárar eitt slíkt stórdýr, greiðir Dorete Bloch Danielsen, professari og hvalagranskari frá.



*Undirkjafturin verður tikin úr springarunum til tess at staðfesta aldurin á djórinum*
*Mynd: Edvard Joensen*






*Finnbjørn Mouritsen og bróðirsonurin, Jóannes Mouritsen, sum nú er stjóri í stóra handilsvirkinum, sum byrjaði sítt virksemi fyri 40 árumsíðani*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Selt máling í 40 ár

**Dagurin í morgin er ein stórur dagur fyri Finnbjørn Mouritsen í Havn. Tá eru liðin 40 ár síðani hann og bróðirin, Eyðun, sáli, fóru undir at selja máling í kjallaranum hjá Linu Arge í Havn. Handilin var 24 fermetrar**

HANDIL Í 40 ÁR
*Eirikur Lindenskov*

Í morgin eru 40 ár síðani, at Málingahandilin hjá Mouritsen brøðrunum lat upp á horninum V. U. Hamm-ershaimbsgøtu/J. C. Svabosgøtu í Havn. Tað vóru teir báðir, Finnbjørn og Eyðun, sum lótu upp handilin. Teir eru synir hjá Andreas Mouritsens, málarameistara, vanliga nevndur Gubbi, og Alvildu, sum var fastur partur av handlinum í nógv ár.

Andreas doyði í bestu árum í 1958, hann var tá 52 ára gamal. Eyðun Mouritsen, sum eisini var málari, tók yvir virksemið hjá pápanum. Og tað var eitt stórt virki, tí hann hevði javnan einar 10-15 mans í arbeiðið. Um tað mundið, tá hann doyði, var hann í ferð við at mála í nýggja bygninginum hjá Føroya Banka í miðbýnum í Havn.

## Byrjaði í Brúksuni

Finnbjørn fór sum 14 ára gamal í læru í Føroya Keypsamtøku í Havn, sum tá hevði til húsa niðri í Bringsnargøtu. Hetta var í 1952. Hann var eisini við, tá Keypsamtøkan keypti húsini í Dr. Jakobsensgøtu, har nýggjur bygningur seinni varð bygdur. Men í 1962, tann 7. september, lótu hann og bróðirin, Eyðun, upp handilin í kjallaranum hjá Linu Arge.

Hóast tað vóru brøðurnir, Finnbjørn og Eyðun, sum stovnaðu og róku handilin, so vóru hinir brøðurnir eisini við okkurt skiftið. Áki, sum nú býr í Danmark, var í mong ár á skrivstovuni, og Arnbjørn var eisini okkurt skiftið í handilinum, hóast hann heldur valdi at starvast sum málarameistari. Arnbjørn og Eyðun doyðu báðir í bestu árum í 1983, einans tríggjar vikur vóru millum deyða teirra.

## Byrjaðu við 24 fermetrum

– Vit byrjaðu í kjallaranum hjá Linu, men har gjørdist skjótt ov trongt, har vóru einans 24 fermetrar. Í 1965 var tí bygt afturat húsnum hjá Linu niðaneftir, og tá vaks handilin munandi, greiðir Finnbjørn frá, tá vit hittu hann á máli í stóra handilsbygninginum á Sandvíkarhjalla í gjár.

Men virsemið vaks alsamt, og neyðugt var tí við enn meira plássi. Í 1970 verður 200 fermetrar stóri bygningurin á horninum Landavegur/J. C. Svabosgøta tikin í nýtslu. Hesin bygningurin var til samans 600 fermetrar í trimum hæddum.

Men fyri at byggja hendan bygningin var neyðugt at keypa tvey hús, sum har stóðu. Á horninum stóðu húsini hjá Christoffer Hansen og við síðuna av teimum húsini hjá Archibald Askaham.

Eyðun Mouritsen búði uppi í Tórfinsgøtu, og skiftu hann og Archibald Askham um hús, soleiðis at stóri handilsbygningurin kundi byggjast. Í desember 1970 lat handlin upp. Nú høvdu Mouritsen brøðurnir so nógv pláss, at partar av bygninginum varð leigaður út. Uppi á lat upp bow-linghøll við matstovu, og var hendan opin nøkur ár fyrst í sjeytiárunum.

## Stór suksé

– Í 1975 tóku vit so tað sinnisjúku avgerð at keypa eitt grundstykki upp í Hoyvík – á nýggja ídn-að-arøkinum, sigur Finnbjørn við einum speiskum smíli.

Men hann leggur afturat, at hetta var tann størsta sukse'in, hann nakrantíð hevur gjørt.

Hann vísir á, at tað var sera vágið í sjeytiárunum at byggja ein stóran hand-ilsbygning so langt uttan fyri býin – og vænta, at fólk kom at keypa, men tað riggaði. Talan var um fyrsta handilsbygningin í Hoyvík, tað var bara Phil & Søn, sum vóru har framman undan. Nakað seinni komu so Reyni Service og Bilasølan Norrøna.

– Vit nevndu handilin Teppihøll, og løgdu dent á teppi og gólvvørur, sigur Finnbjørn.

Hesin bygningurin var 1.500 fermetrar til víddar, og er tað bygningurin, har Føroya Fornminnissavn heldur til í dag. Bygningurin hýsir m. a. viðgitnu Kirkjubøstólunum.

Fyrst í áttatiárunum varð bygningurin víðkaður við enn 1.500 fermetrum, og fóru teir nú undir eisini at selja møblar.

Um hetta mundið keptu og umvældu teir eisini ein bygning á Tvøroyri, og hevur handilin havt deild har síðani. Eitt skifti seldu teir eisini kurvamøblar og eitt sindur av møblum í gamla bygninginum hjá Holgar Jensen í Niels Finsensgøtu í Havn. Men í 1989 varð enn eitt stórt stig tikið, tí tá lat upp stóri handlin á Sandvíkarhjalla, sum er 4.800 fermetrar til víddar.

## Eldur og kreppa

Tað gjørdist kortini eitt stórt bakkast hendan dagin, handilin skuldi lata upp.

– Tá vit komu niðan í handilin hendan dagin, stóðu brandbilar í túninum, greiðir Finnbjørn Mouritsen frá.

Eldur var av einhvørjari ókendari orsøkin kyknaður í forhøllini til goymsluna, og hóast brandskaðin ikki var so stórur, so var nógvur roykskaði.

– Alt húsið mátti tømast og vaskast. Hetta var eitt stórt bakkast, sum ávirkaði søluna í fleiri mánaðir aftaná, greiðir Finnbjørn Mouritsen frá.

Eftir hetta rendi alt samfelagið seg í búskaparkreppuna, sum eisini hevur havt sína stóru ávirkan á handilsvirksemið hjá Finnbjørn og hinum í Málinghandlinum, sum havnarfólk framvegis kalla handlarnar hjá Mouritsensbrøðrunum.

Málingahandlarnir hjá teimum virka í dag undir heitinum Litaval. Hetta er ein keta av sjálvstøðugum handlum í Føroyum, sum tó eru partar av donsku ketuni, Farveland. Finnbjørn Mouritsen sigur, at tað ber illa til í dag at virka sum handilsmaður, uttan tú ert við í einhvørjari ketu, tað sama er við møblahandlunum, sigur hann.

## Finnbjørn tuskar enn

Finnbjørn Mouritsen er í dag 64 ára gamal. Hann hevur trekt seg eitt sindur aftur, og hevur latið yngri kreftir komið til. Stjóri í fyritøkuni í dag er Jóannes Mouritsen, bróðirsonur hansara, meðan Finnbjørn sjálvur er deildarleiðari í stóra handilinum á Sandvíkarhjalla.

Men at futtur framvegis er í honum, kennist á øllum brøgdum. Meðan vit órógva hann í ein lítlan hálvan tíma inni á skrivstovuni aftur við einum kaffimunni, kláraði hann at selja minst ein kantklippara gjøgnum telefonina, og meðan vit ganga út gjøgnum handilin – útum at taka eina mynd, avgreiðir hann onkran kunda á vegnum.

Í dag, fríggjadag, bjóðar handilin til móttøku í HB-húsinum millum kl 15 og 17.

– At halda ein 40 ára dag er kanska ikki so nógv. Men eg vænti neyvan, at eg verði við, tá 50 ára dagurin verður hildin, tí hvør arbeiðir, til hann verður 74? spyr Finnbjørn okkum.

Okkara boð er, at Finnbjørn tuskar við sama lag í handlinum um 10 ár.

Hjartaliga tillukku við degnum!



*Her í kjallaranum hjá Linu Arge byrjaðu brøðurnir Finnbjørn og Eyðun Mouritsen virksemið hjá Málingahandilinum í 1962*